# Aftur eitt gott ár hjá fiskimonnum

**Prísirnir eru lækkaðir eitt sindur, men fiskiskapurin hevur verið góður, so sum heild hevur tað gingið gott**

FISKISKAPUR
*Áki Bertholdsen*
*aki@sosialurin.fo*



*Nótabátar, sum Christian í Grótinum hava gjørt tað sera gott í ár og teir eru tann skipabólkur, sum hevur staðið seg allarbest í ár*

Sum heild hevur 2004 verið eitt gott ár hjá okkara fiskimonnum.

Tað er tann stutta niðurstøðan, sum Óli Jacobsen, formaður í Fiskimannafelagnum, hevur at bera fiskimonnum, tá ið teir hittast á landsfundi í morgun.

Einir 100 fiskimenn plaga at verða á árliga landsfundinum hjá Fiskimannafelagnum, har teir fara at viðgera ymisk viðurskifti, sum hava týdning fyri teirra viðurskifti, bæði á sjógvi og landi.

Formaðurin í Fiskimannafelagnum sigur, at tað er ógvuliga misjavnt, hvussu árið í ár hevur hilnast hjá okkara fiskimonnum í teimum ymsu skipabólkunum.

Men sum heild hevur hetta verið eitt gott ár hjá fiskimonnum, sigur hann.

– Árið í fjør var eitt sera gott ár. Í ár hevur tað ikki gingið heilt líka væl, men kortini má sigast, at sum heild hevur 2003 verið eitt gott ár, sigur Óli Jacobsen.

Hann sigur, at fiskiskapurin hevur verið góður, men at prísurin ikki hevur hildið sama støðið, sum í fjør.

Men tað er sjálvsagt ógvuliga ymiskt, hvussu tað hevur verið hjá teimum ymsu skipabólkunum.

Hjá Rækjuskipanum hevur verið heilt galið og tað er tann skipabólkur, sum er ringast fyri.

Hjá teimum, sum manna rækjuflotan, hevur miðalhýran ikki verið meiri enn 1.200 krónur upp á mannin um dagin.

Til samanberingar kann nevnast, at ein dagløn hjá einum arbeiðsmanni á landi er 865 krónur fyri átta tímar við sáttmálasettari tímaløn.

### Línuskip skara framúr

Hinvegin sigur Óli Jacobsen, at ísfiskalínuskipini hava havt eitt sermerkt gott ár og tað er tann skipabólkurin, sum skarar framúr.

– Samstundis er støðan hjá ísfiskalínuskipunum í ár, besta dømi um, hvussu óútrokniligur fiskiskapur er.

– Vanliga plaga tey at fiska væl um várið og um heystið, men um summarið hevur ikki borið ti. Men nú er tað fullkomiliga broytt, so at tey eisini hava fiskað væl í summar.

Hann sigur, at hetta sæst aftur manningahýrunum hjá ísfiskalínuskipunum, har hvør maður hevur forvunnið yvir 1.800 krónur um dagin í ár í miðal.

Hetta er tríggjar ferðir so nógv sum fyri 10 árum síðani og setir eina tjúkka striku undir tað undur, sum línuskipunum hevur verið fyri hesi síðstu árini. Fyri nøkrum árum síðani var tað bara undantak, at hýran fór upp um minstuløn, men nú er hetta besti skipabólkur av ísfiskaskipunum og teir hava havt ein fiskiskap, sum ongin tordi at droyma um fyri nøkrum heilt fáum árum síðani.

Samstundis er hetta eisini eitt dømi um, hvussu fullkomiliga óálítandi metingarnar hjá fiskifrøðingunum er, tí ongar av teirra metingum hava hildið.

Eisini hjá teimum stóru lemmatrolarunum, hevur tað gingið rættiliga væl í ár, tí har hevur manningaparturin verið góðar 1.600 krónur upp á mannin um dagin og tað er ein lítil lækking afturímóti í fjør.

Og hjá partrolarunum, sum fiska upsa, hevur talan verið um eina afturgongd, so hjá teimum hevur inntøkan verið góðar 1.500 krónur uppá mannin í miðal um dagin. Hjá garnaskipunum er hýran 1.400 krónur í miðal um dagin.

Men best av øllum eru enn sum áður nótaflotin. Teir, sum sigla við nótaskipum, hava í ár forvunnið 3.000 krónur í miðal um dagin.

# Tað er gamaní at vera frelstur í góðum tíðum

**– Tað er, tá ið tað gongur illa, at tað er brúk fyri einum virknum vinnupolitikki. Men rækju-skipini eru eitt gott dømi um, at í Føroyum er ongin vinnupolitikkur, sigur Óli Jacobsen**

RÆKJUKREPPA
*Áki Bertholdsen*
*aki@sosialurin.fo*



*Árið í ár setir eina tjúkka striku undir tað undur, sum ísfiskalínuskipunum hevur verið fyri, sigur Óli Jacobsen*

Tað er gamaní at vera frelstur í góðum tíðum.

Hetta er skoðsmálið, sum føroyskir politikarar fáa frá formanninum í Føroya Fiskimannafelag.

Og hetta skal sjálvsagt skiljast í fluttari merking.

Tí tað, hann hugsar um, er kreppan í okkara rækjuvinnu.

– Tað er gamaní hava eina greiða støðu til, at vinnan ongan studning skal hava, tá ið tað gongur væl. Men tað er tá ið tað gongur illa, at vit hava brúk fyri einum virknum vinnupolitikki.

Og tað er her, at Óli Jacobsen heldur, at okkara politikarar hava svikið.

– Støðan er tann, at teir vilja ella tora ikki so mikið sum at viðgera kreppuna, sum rækjuvinnan er í og tað er her hetta, sum er átaluvert, heldur formaðurin í Fiskimannafelagnum.

Hann heldur, at tað minsta kravið kundi verið, at politikarar tóku støðuna hjá rækjuvinnuni upp til veruliga viðgerð.

– At nokta fyri at viðgera støðuna hjá rækjuvinnuni, kann vera ein politisk støða í sær sjálvum.

– Men tað, sum er at fýlast á, er, at í løtuni vita rækjumenn ikki, um teir eru keyptir ella seldir. Ein dagin sigur ein politikari í samgonguni, at teir fara at viðgera støðuna hjá rækjuvinnuni, men dagin eftir sigur onkur annar, at tað fara teir ikki. Ein dagin sigur ein politikari í samgonguni, at samgongan fer at lata rækjuvinnuni stuðul, men dagin eftir verður hetta avsannað av einum øðrum umboði fyri rækjuvinnuni.

– Tí veit rækjuvinnan ikki, hvar hon flýtur og tað er átaluvert, heldur Óli Jacobsen.

Og nú hendir so onki, fyrrenn nýtt landsstýrið er skipað, og, hvar rækjuflotin er tá, er ikki gott at vita.

### Ikki altíð skilaleyst

Óli Jacobsen vísir á, at tað er ikki sagt, at tað altíð er skilaleyst at lata stuðul.

– Grundarlagið undir Norrønu er studningur, tí hon er undir FAS- skipanini, har Smyril Line fær ein fittan part av hýrunum til manningina endurrindaða. Sjálvt AP Møller og aðrir, útendskir stórreiðarar, fáa stuðul, tí tey, sum sigla við teirra skipum, betala als ongan skatt fyri at reiðarin skal sleppa bíligari í hýrum.

Í so máta kunnu vit siga, at bæði AP- Møller og aðrir stórreiðarar fáa eisini studning frá føroyska samfelagnum, tí nógvir føroyingar sigla við teirra skipum, uttan at betala skatt í Føroyum.

– So studningur er als ikki ókendur í Føroyum, men á øðrum økjum, eru politikarar hvørki til at høgga ella stinga í og tað er nokk so óskiljandi, heldur Óli Jacobsen.

Óli Jacobsen heldur tí, at Landsstýrið skuldi havt tikið støðuna hjá rækjuflotanum til viðgerðar.

– Støðan hjá rækjuvinnuni skuldi verið gjørd upp, so at greiða fæst á, hvat vinnan kastar av sær til samfelagið.

Tað arbeiðið hevur felagið rækjuskip longu gjørt og politikarar eiga at gera sær greitt, hvat skal til, fyri at rækjuvinnan kann hóra eitt ár, ella tvey afturat, til kreppan er av.

– Men so langt eru politikarrnir ongantíð komnir, sigur formaðurin í Fiskimannafelagnum.




# Saman standa vit so nógv sterkari!!



Erikka Elttør
Meihardt Hansen
John Kári Jacobsen
John William Joensen
Karl Olgar Joensen
Bjørn Kalsø
Magni Laksáfoss

*Frá vinstru: Magni Laksáfoss, John Kári Jacobsen, Karl Olgar Joensen, John William Joensen, Erikka Elttør, Bjørn Kalsø og Meinhardt Hansen.*

Norðoya Sambandsfelag:
TELEFON
45 90 45
45 91 45

## Ein nýggjársheilsan frá Sambandsflokkinum í norðoyggjum

Nú valið stendur fyri durum, vilja vit hervið loyva okkum at siga frá okkara støðu um samfelagsstøðuna og framtíðarmøguleikarnar hjá okkum øllum, ið her búgva.
Eftir fimm stak góð ár við góðum fiskaprísum og fiskanøgd, bendir alt meir á, at tað reka myrk skýggj inn yvir landið - búskaparstøðan er ikki eins góð longur.
Fullveldissamgongan, sum segði seg sita tungt á kassanum, hevur økt almennu útreiðslurnar við meir enn einari milliard seinastu 5 árini - hetta er størsti vøkstur nakrantíð í Føroya søgu.
Orsaka av vánaligu fíggjarstýringini, vildi fullveldissamgongan leggja fleiri byrðar á borgararnar
- minking av rentustuðulinum frá 40 niður á 37 prosent, avgjald á bomm, keks, sodavatn og plastikkposar, umframt fleiri aðrar sparingar so sum minking í minstulønini til fiskimenn og minking av barsilsgjaldinum.
Hesi tiltøk kundi Sambandsflokkurin ikki ganga við til!

**Sambandsflokkurin hevur í staðin arbeitt við** eini vinnuligari ætlan, sum fer at styrkja okkara búskap. Vit eru øll stolt av at vera føroyingar og vita vit, at dugur er í okkara arbeiðsfólki og sjómonnum. Tí er eingin ivi um, at vit framhaldandi fara at menna hetta samfelagið, bara vit stýra rætt.
Eftir 5 ára vanrøkt av búskapinum, er neyðugt, at bróta upp ermar og fáa skil aftur á búskapin. Vit ynskja ikki at leggja fleiri byrðar á teg, men heldur menna hetta samfelagið gjøgnum vinnumenning og minkan av almennu fyrisitingini.
Umframt at styrkja vinnuna og búskapin, vilja vit eisini arbeiða fyri at betra um gerandisdagin hjá tær. Vit vilja tryggja okkum, at vit fáa kommunulæknaskipanina at virka, so tú sum borgari hevur ein kommunulækna at fara til. Harumframt skulu vit varðveita rentustuðulin á 40 prosentum. Hetta eru tiltøk, ið kunnu hjálpa familjum og teimum eldri.
Valið 20. januar er eitt søguligt val, har tú sum borgari kanst velja, um tú á aðrari síðuni vilt hava meir loysing, yvirtøkur og vaksandi almenna umsiting ella á hinari síðuni vælferð, framburð og tryggleika í hesum samfelagnum.
Vit vilja gera alt fyri, at tú sum borgari skalt hava tað trygt og gott í hesum landi. Hetta krevur bert, at vit standa saman og arbeiða fyri einum vælferðarsamfelag fyri øll. Sambandsflokkurin fer at gera tað betur at liva í Føroyum.

***At enda vilja vit ynskja tær øllum føroyingum eitt av Harranum signað nýggjár***

## Tiltøk hvørt mánakvøld - í januar

**Mánadagin 5. Januar 2004 Kl. 19:00**
Ungdómur, útbúgving og framtíðin hjá fiskivinnuni.
Fyrilestur og kjak í Pizzaria Napoli við Klaksvíksvegin



Gestur Hovgard, frá **Granskingardeplinum fyri Økismenning** heldur fyrilestur um evnið: Ungdómur, útbúgving og framtíðin hjá fiskivinnuni.
Eisini vitjar **Bárður Nilsen**, tinglimur, og høvið verður at tjakast um evnið.

**Mánadagin 12. Januar 2004 kl. 19:00**
Teir umboðaðu sambandsflokkin og norðoyggjar.

**Anja Andreasen, søgufrøðingur** heldur fyrilestur í Pizzaria Napoli við Klaksvíksvegin um teir, sum hava umboða Sambandsflokkin og norðoyggjar á tingi.



Klæmint Olsen, sýslumaður, Klaksvík, Tingmaður 1877 - 1910 | Michael Matras, keypmaður, Viðareiði, Tingmaður 1901 - 1906 og 1914 - 1924 | Símun Júst Jacobsen, lærari, Svínoy Tingmaður 1910 - 14 | Jógvan Hansen, kongsbóndi, Húsum Tingmaður 1928 - 32 | Óli Fr. Joensen, keypmaður, Klaksvík Tingmaður 1924-28, 1932-46 og 1950-54 | Eli Nolsøe, skrivstovumaður, Klaksvík Tingmaður 1978 - 84

Eisini fáa **valevni floksins orðið** og greiða frá hvussu tey fara at umboða norðoyggjar á tingi, og eisini verður møguleiki at kjakast og seta spurningar.



**Mánadagin 19. Januar 2004 kl. 19:00 - 22:00**
Val-hugni, Contry og alt gott føroyskt.
Kvøldi fyri valið bjóða vit øllum norðoyingum til
kaltborð við føroyskum viðskera.

**Ragnar í Vík** syngur og spælir Contry-sangir.